

# Fimm føroysk met og sjey juniormet

**SVIMJING Føroysku svimjararnir megnaðu í morgun at seta fýra nýggj føroysk met og fimm føroysk juniormet, á norðurlendsku meistarastevnuni fyri ung, sum hevur verið í Drammen um vikuskifti**

Eirikur Lindenskov

Magnus Jákupsson vann sær hartil silvurheiðursmerki í 50 metra firvaldasvimjing, og bronsuheiðursmerki í 200 metra ryggsvimjing, skrivar Svimjisamband Føroya í tíðindaskrivi.

Fyrst setti Magnus Jákupsson úr Havnar Svimjifelag nýtt føroyskt met og juniormet í 50 metra firvaldasvimjing, tá ið hann svam seg til silvurheiðursmerki við tíðini 25.90, har juniormetið hjá honum frá Small States stevnuni í Hafnarfirði herfyri var 26.05, og føroyska metið hjá Kára J. á Høvdanum frá heimsmeistarastevnuni í Rom í fjør summar var 26.03.

Síðani setti Cecilia Eysturdal úr Ægir nýtt juniormet í 400 metra frísvimjing, við tíðini 4:41.07, har juniormetið hjá Moniku Biskopstø úr Ægir var 4:41.81, frá Reykjavík International Games í januar í ár. Tíðin rakk til eitt sættapláss av 12 luttakarum í hesi grein á norðurlendsku meistarastevnuni.

So svam Magnus Jákupsson úr Havnar Svimjifelag seg aftur til føroyskt met og føroyskt juniormet, tá ið hann í 200 metra ryggsvimjing vann bronsuheiðursmerki við tíðini 2:11.26, har føroyska metið hjá Kára J. á Høvdanum frá evropeisku juniormeistarastevnuni í Beograd í 2008 var 2:12.62, og kravtíðin frá heysti 2008 til at kunna seta føroyskt juniormet var 2:11.99.

So setti Tanja Skaalum úr Suðuroyar Svimjifelag føroyskt met og juniormet í 100 metra bringusvimjing, tá ið hon svam teinin uppá 1:17.08, har føroyska metið hjá Maluna V. Bærendsen frá donsku meistarastevnuni í 2008 var 1:17.30, og juniormetið hjá Tanju sjálvari frá Small States stevnuni í Hafnarfirði herfyri var 1:18.10. Eitt flott fjórðapláss til 12 ára gomlu Tanju árgang 1997, við trimum eldru 1996-arum frammanfyri seg, og fimm 1996-arum aftanfyri seg eisini.

Og at enda sorlaðu tær fýra Cecilia Eysturdal, Tanja Skaalum, Turið S. Christiansen og Guðrun Mortensen føroyska landsliðsmetið í 4x200 metra frísvimjing, við at svimja teinin uppá 9:18.40, har føroyska metið hjá Shailu millum Garðarnar, Elspu Mørkøre, Lisbeth L. Joensen og Sáru Ejdesgaard frá íslendsku meistarastevnuni í 2004 var 9:54.55. Ein betring uppá 36.15 sekund, hjá hesum fýra gentum árgang 1996 og 1997, harav tvær fyrst verða veruligir juniorar næsta ár, og hinar báðar í 2012.

Í gjár setti Magnus Jákupsson sum kunnugt føroyskt juniormet í 50 metra ryggsvimjing, tá ið hann vann sær gullheiðursmerki við tíðini 27.68, har juniormetið hjá Kára J. á Høvdanum frá EJM í Beograd í 2008 var 27.89. Umframt at tær fýra Cecilia Eysturdal, Guðrun Mortensen, Tanja Skaalum og Turið S. Christiansen settu føroyskt met og juniormet í 4x100 metra frísvimjing, við tíðini 4:19.01 har føroyska metið og juniormetið frá Small States 2010 var 4:20.30.

So tilsamans settu hesir ungu svimjarar altso fimm (5) føroysk met og sjey (7) føroysk juniormet, hesar báðar dagar í Drammensbadet í Noregi. Hóast tað gekk eitt sindur upp og niður til tíðir, so er hetta eitt avgjørt góðtikið úrslit, hjá hesum svimjarum sum enn ikki hava rokkið veruligan junioraldur, og tó so seta bæði juniormet og seniormet.

*eirikur@sosialurin.fo*

# Stig-Roar til B36

**FÓTBÓLTUR Í vikuni gjørdist tað greitt, at norski framherjin hjá AB, Stig-Roar Søbsted, skiftir til grannarnir úr B36. – Tá eg kom til AB høvdu teir ambitiónir um at kempa millum fýra tey fremstu, men soleiðis er støðan ikki longur, sigur Stig-Roar Søbstad**

Tróndur Arge

Hóast AB hevur brúk fyri øllum góðum kreftum í løtuni, so kunngjørdi felagið fyri kortum, at toppskorarin, Stig-Roar Søbstad, ikki verður at síggja í AB troyggjuni framyvir. Hann hevur valt at skifta til B36, sum í fjør endaði aftanfyri AB á stigatalvuni.

– Tað var stuttligt at spæla í fjør, tí vit kláraðu okkum so gott, men í ár hava vit bara kempa í botninum. Eg havi ikki verið eins motiveraður í ár og tað er ein av orsøkinum til at eg velji at skifta frá AB, sigur Stig-Roar Søbstad.

Fíggjarliga støðan hjá AB hevur gjørt, at felagið fyrr í ár koyrdi allar spælararnir niður í løn. Eisini hava teir sagt farvæl við Tórð Thomsen, ið skifti til HB, og nú Stig-Roar Søbstad.

– Tað er tað klárt, at spælararnir hava krav uppá sínar pengar og fáa teir ikki tað, so ávirkar tað moralin, sigur Stig-Roar Søbstad.

Stig-Roar Søbstad hevur í ár skorað seks mál fyri AB, men hevur ikki funnið sama formin, ið hann vísti tá hann kom til felagið í seinasta summar.

– Eg havi sæð B36 spælt og mær dámar væl teirra spælistíð. Teir hava nógvar góðar álopskendar leikarar og koma til nógvar mál møguleikar. Eg kenni á mær at eg kann gera mun og vónandi kann eg hjálpa teimum, sigur Stig-Roar Søbstad.

Argjamenn og Stig-Roar Søbstad skiljast í sátt og semju og tað er einki ilt ímillum partarnir.

– Eg havi havt tað gott á Argjum og ynskji teimum alt tað besta. Vit skiljast sum vinir og eg havi verið og sagt farvæl og havi fingið bæði klemm og mussar, sigur Stig-Roar Søbstad við einum smíli eftir dystin ímóti ÍF.

*trondur@sosialurin.fo*



*Stig-Roar Søbstad, her í sísta dysti sínum í AB-troyggjuni í Fuglafirði. Eftir summarsteðgin verður normaðurin at síggja í hvíta B36-búnanum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## FC ARGIR:

# Ikki fíggjarlig kreppa á Argjum

Tróndur Arge

AB valdi fyri kortum at lata toppskorarin í ár, Stig-Roar Søbsted, fara til B36. Fyrr í ár koyrdi felagið allar leikararnar niður í løn, men sambært Sjúðri Olsen úr FC Argjum er tað ikki fíggjarlig kreppa í AB.

– Nei tað er ikki fíggjarlig kreppa í AB. Vit fyribyrgja bara, at AB kemur í fíggjarligt óføri. Vit mugu spara har vit kunnu, sigur Sjúrður Olsen úr FC Argir, sum rekur besta liðið hjá AB.

AB hevði í fjør tað besta kappingarárið í søgu felagsins, tá teir endaðu á einum sætta plássi. Í ár hevur støðan verið ein onnur. Felagið hevur undir niðurflytingarstrikuni í alt ár og eru í løtuni á einum deildum aftasta plássi saman við FC Suðuroy.

– Vit hava fleiri góðat spælarar á næstbesta liðnum, ið eru klárir at traðka til á besta liðnum. Eitt nú Jákup Dam, sum byrjaði inni í Fuglafirði. Vit hava eisini onkran styrk í kikarinum til at avloysa Stig-Roar, sigur Sjúrður Olsen.

AB missur eisini Alex Mellemgard (18), Jobin Drangastein (19) og Tummas Justinussen (20), sum allir fara á fótbóltsskúla í Ikast í Danmark.

– Ein av orsøkinum til at eg eri við í AB, er fyri at uppala egnar spælarar. Vit stuðla sjálvandi nú teir fara og vóna at teir koma aftur enn betri enn teir eru. Vit leita í løtuni eftir styrki til at avloysa teir tríggjar, sigur Sjúrður Olsen.

Teir byrjaðu allir tríggir inn í Fuglafirði leygardagin. Alex Mellemgaard er tann spælarin hjá AB, sum hevur spælt triðj mest minuttir fyri AB í ár.

– Vit gera alt í okkara magt fyri at yvirliva í bestu deildini, men tað er ongin vanlukka um vit flyta niður. Eg eri ikki í iva um, at vit koma uppa aftur beinanvegin, sigur Sjúrður Olsen

AB hevur í løtuni 10 stig og liggur á einum deildum aftasta plássi saman við FC Suðuroy. AB hevur spælt ein dyst fleiri enn hini botnliðini.

*trondur@sosialurin.fo*